Ólavsøkurøðan á Háskúlanum 2024

Vit hava øll sæð myndir frá teimum mongu, sum millum ár og øldir hava floymt inn í USA, sum sigldu fram við Frælsistandmyndini inn í vónina.  Skip eftir skip fullfermd við vónum og skapanarmegi, hugskotum og ógviliga ymiskum áskoðanum á tilveruna – tey skaptu tann sjóðandi pottin New York

Soleiðis eru fólk eisini altíð komin til Havnar. Av bygdum og úr útlondum. Tey róðu higar, komu við deyðsiglarum, við Sigmundi og Vesturleið og Smyrli. Tey sigldu ikki fram við nakrari frælsisstandmynd, men einum berligum, aldubrýndum tanga. Men eisini tey høvdu sínar tankar, vónir og ætlanir við sær.

Havnin hevur fingið mangar sjaldsamar gávur við hesum fólkum við tonkum og hugskotum og íblástri og kraft. Saman við havnarfólki gjørdu tey eisini Havnina til ein sjóðandi pott.

- Vit hava eyðvitað í mong ár havt tann stóra trupulleikan, at nógv heilamegi hevur verið sogin úr landinum – og við teimum hava vit mist nógva kraft, sama flytingin hevur verið av bygd til Havnar, og her hava mong gjørt stóran mun. Og tað ger kanska sítt til, at hvør krókur í landinum heldur seg eiga eitt partabræv í Havnini.

Men fólk eru komin til Havnar. Og væl ber til at fylgja fleiri

slóðum. Eg fari at fylgja onkrari, sum knýtir seg til henda týðandi lærdómsdepilin, vit eru stadd á í dag.

Ein danskur embætismaður ættaður úr Neder Schlesien fekk embæti sum fúti í Havnini í 1723. Hann æt Jørgen Frantz de Hammerhaimb, og hann átti ein langabbason, sum heilt ungur gav okkum skriftmálið mitt í 19. øld. Hesin ungi studenturin gav okkum lykilin til, at vit aftur fóru at skriva og geva bløð út og kjakast um at fáa okkara egna mál viðurkent aftur.
Men tann tankan hevði hann ikki frá fremmandum. Ommubeiggi V.U. Hammershaimb var miðvingurin Jens Christian Svabo, vísindamaðurin, sum kom aftur til Havnar seinast í 1700 árunum og stilltigandi legði grundina undir tað arbeiðið, ið gjørt er við føroyskum máli.

Í 1848 kom ein kondittari úr Keypmannahavn – hann æt Martin Christian Restorff og nakað seinni kom ein bakari av Bornholm, sum æt Casper Georg Hansen. Martin gekk seinni undir navninum gamli Restorff og hin varð bara kallaður Bakar Hansen. Teir eru fyrimyndir fyri ta fullkomnu integrasjónina í Havn, teir stórtrivust her – og góvu okkum nógvan tónleik, heimsins bestu rómakakur og gott øl. Tað var eitt kvetti av teimum stóru.

Og síðan verður alt so hegnisliga flættað saman, tí William Heinesen, sum er abbasonur gamla Restorff og glyvramaðurin

Jørgen-Frantz Jacobsen eru skyldmenn og haraftrat vinmenn, og teir báðir settu Føroyar á bókmentaliga heimskortið. Teir báðir eru ein intellektuell greipa, sum Føroyar ikki hava sæð makan til síðan.

Og aðrir komu úr øllum herðshornum í landinum.

Av Viðareiði og úr Skálavík komu tveir úrmælingar, sum búsettust í grannalagnum hjá Williami uppi undir Varða. Teir Heðin Brú og Chr Matras og William vóru eitt so sjaldsamt grannalag, at sama hvat campus, Fróðskaparsetrið onkuntíð fær at rigga, so fer tað at hava sítt dýra stríð at standa mát við campusið, sum var uppi undir Varða, tí frægari høvundar og málfrøðingar enn teir eiga vit ikki. Og teir løgdu nógv eftir seg, sum vit kunnu njóta gott av.

Ein miðvingur og ein skarðsmaður gjørdu eisini sínar dreymar til veruleika her í býnum. Eingin hevur gjørt so stóran mun í føroyskari skúlasøgu sum Símun og Rasmus. Eingin hevur givið so nógvum fólki so nógvan íblástur og økt tilvitskuna um virðini í okkara egna sum slóðararnir á Háskúlanum. Teir stimbraðu okkum, lærdu okkum at at síggja virðini í okkara egna. Teir lótu gluggar upp, sum annars ikki høvdu verið latnir upp áður.

Síðan tóku ein eiðismaður, ein fuglfirðingur og elduvíkingur stig til studentaskúla.  Og tú undrast og spyrt, hvat fær ein bóndason úr Elduvík at lesa franskt í 1920árunum ?

Eg hevði henda elduvíkingin Haraldsen í fronskum og týskum fyri hálvari øld síðan - og eg elskaði hansara tímar. Hann tulkaði Goethe og Schiller og Voltaire fyri okkum, so vit fóru sveimandi saman við honum inn í týskar og franskar bókmentir.
Teir løgdu lunnar undir skúlan, sum ikki bara vakti fólk, men gjørdi okkum før fyri at fara á universitet úti í heimi og koma aftur sum læknar og løgfrøðingar og lívfrøðingar og so mangt, mangt annað. Hetta var tann krumtøppurin, sum gjørdi okkum før fyri at flyta okkum inn í nútíðina og smátt um smátt fara at taka okkum av at stýra okkara egna landi.

Fyri stívliga hálvari øld síðan nældi so ein spíri, ið fáur spáddi fór at trívast. Tað var, tá ið Christian Matras, Hanus Debes Joensen og Jóannes Rasmussen og aðrir fóru undir eitt fróðskaparsetur í Havn. Tað var sjálvandi at fara langt, langt út um mark.
Eitt universitet í Havn – Hann náði okkum!
Nú hálva øld seinni síggja vit teirra tankar spretta. Teir hugsaðu nógv størri enn tey allarflestu, heldur ikki teir sóu sínar tankar veruliga blóma í síni tíð, men teir sáddu og nú njóta við ágóðan av teirra visjónum.
Tá ið vit nú eru farin at tosa um universitetssjúkrahús í Havn, hava vit longu mýlt ta ringasta mótstøðuna av. Vit hava flutt okkum so langt og fingið so gott sjálvsálit, at nú ber eisini tað til.

Røturnar til success-søguna hjá nýggju Havnina eru gamlar og

virðismiklar – felagsnevnarin er, at øll gjørdu burtur úr okkara tilfeingi eftir teimum korum, ið vóru. Men nýggir tankar og nýggjar tíðir ganga hond í hond – hugsa vit ikki nýtt, fáa vit tað sama, vit altíð hava fingið. Men nýggj fólk og nýggir tankar hava trokað tað gamla av.

Hugstoytt er kortini at hugsa sær, at allir teir stóru tankarnir, ið hava borið okkum fram, hava stríðst við tankar, sum settu seg upp ímóti, sum hakaðu í, forðaðu og royndu at forkoma tí, ið seinni vann. Tann partin lata vit liggja í dag, tí í dag er veitsludagur. Men eitt knoss hevur tað verið at flyta tey mongu stikini, sum hegnaðu okkum inni í trongum og aveldum hugsanum.

Í bókini eftir hetlendingin John Goodlad: The Salt Roads, sum Regin av Steinum so hegnisliga hevur týtt okkum til okkara mál, og sum kemur út í vetur, lýsir hann ein ógviliga gávuríkan hetlending, nevndur Haldane Burgess. Ein maður, sum vaks upp undir trongum korum, men var so evnagóður, at hann slapp inn á universitetið í Edinburg, har hann gjørdist gitin. Men hann fekk einhvørja sjúku og misti sjónina. Í bókini verður hann lýstur sum 'hin blindi maðurin, ið sá inn í myrkrið;
hann sá ikki tvørtur um vegin, men sá gjøgnum øldirnar'.

Hesin Haldane lærdi m.a. hetlendingar siglingarlæru – lærdi teir, hvussu teir við kunnleika kundu finna fiskileiðir undir Grønlandi og á stóru kanadisku grunnunum. Tað snúði seg um kunnleika og

lærdóm. Við tí førninginum raktu teir gullnámini - á botni - fjart frá heimaoyggjum.

Hansara søga kundi verið partur av okkara egna søga. Vit áttu eisini tey, sum sóu longri enn flestu okkara og spýttu í lógvarnar og virkaðu fyri, at tær sjónir, tey sóu fyri sær, vórðu veruleiki.

Tey sáddu og vistu ikki, hvussu stórur ávøksturin fór at verða, men álitið á, at tað var rætt, ið gjørt var, fekk tey at spenna seg út. Hugsaði mangan um tað at velta upp úr nýggjum, tá ið vit arbeiddu við bókini um Rituvík, sum Runavíkar kommuna bað okkum seta upp í vetur.

Jólaaftan í 1873 fara tey bæði Per og Nicolina Højgaard av Toftum til Rituvíkar. Vóngóð og treyst. Ganga ikki fram við nakrari Frælsisstandmynd, men kortini inn í vónina. Tey eru nýligani gift og flyta í nýggj hús í Rituvík. Tey fáa 12 børn. Og eftir tey eru 1000 eftirkomarar. Frá 1873 til aldarskiftið vóru 8 húski í Rituvík – og har uddi við børnum, sum spældu í túninum. Nú - 150 ár seinni - kunnu vit telja 10.000 eftirkomarar av hesum niðursetufólkum.

Hetta er tað, sum stundum hendir, tú ið fólk leggja til brots og í treysti royna nýggjar leiðir. Hetta er vakra søgan um sinnopskornið enn eina ferð.

Vit eru bundin at tíð og staði. Men vit duga væl at síggja, tá ið vit kveita aftur um okkum, hvussu avrik hugsað eina tíð, slóða fyri nyttu og nýtslu í aðrari tíð.

Vit, sum eiga pallin nú, hava notið væl av teimum sjónum, okkara forfedrar hava framt í verki. Sjónir teirra, ið sóu inn í myrkrið, sum sóu ígjøgnum øldirnar. Ikki minst øllum tí, ið varð hugsað, slóðað varð fyri og framt varð í verki á háskúlanum.

Góða ólavsøku